# Stór útstykking er á veg í Klaksvík

**Borgarstjórin í Klaksvík tekur undir við, at ein stór útstykking verður gjørd í Klaksvík sum skjótast. Fyrsta ætlanin er at gera upp ímóti 40 grundstykki byggiklár á Helnabrekku, men hann harmast um, at tað eru eini 80 privat grundstykki í býnum, sum tað ikki verður bygt á**

BYGGING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Næsta stóra útstykkingin í Klaksvík verður gjørd á Helnabrekku næsta ár. Hon kann koma at rúma upp til 60 grundstykki*

Klaksvíkar kommuna ætlar at raðfesta útstykkingar av grundøkjum í kommununi.

Bíðilistin eftir kommunalum grundøki veksur so at siga dagliga, og borgarstjórin heldur, at ein munagóð útstykking skal gerast sum skjótast.

Býráðslimurin Kristian Eli Zachariassen skrivar í eini grein í Norðlýsinum nú um dagarnar, at tað er bráneyðugt at gera nakað við tørvin á grundstykkjum.

– Ígjøgnum tey seinastu árini hava fleiri minni útstykkingar verið framdar. Alt gott um hesar útstykkingar, men tær hava ikki megnað at loyst trupulleikan við bíðilistanum. Neyðugt er, at Klaksvíkar Kommuna setur sær fyri at loysa tørvin. Serstakliga nú hugsa verður um, at tað skjótt verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, skrivar Kristian Eli Zachariassen.

Tað standa næstan 150 fólk á bíðilista, men býráðslimurin heldur, at aktuelli tørvurin er eini 100 grundstykki.

### Fleiri útstykkingar

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, sigur, at kommunan arbeiðir við at útvega borgarunum grundstykki, og fyrsta ætlanin er bæði stór og ítøkilig.

– Fyrsta ætlanin er á Helnabrekku, har vit næsta ár ætla at útstykkja eitt stórt øki við upp til 40 grundstykkjum. Har verður við tíðini pláss fyri eini 130 húsum afturat tí, sum er bygt higartil. Vit hava gjørt eina minni útstykking á Norðoyri til 22 hús, og so skulu vit eisini hugsa um, at Domus-ætlanin á Helnabrekku umfatar eini 25 íbúðarhús, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

Harafturat skal eisini ein útstykking gerast Undir Fossum í sambandi við ringvegin har, og har verður í fyrstu syftu pláss fyri 24 grundøkjum. Hendan ætlanin er ikki so ítøkilig sum hinar, tí her skal lendi keypast frá privatum.

– Eg eri púra samdur við teimum, sum halda, at ein munagóð útstykking skal gerast í býnum. Tað havi eg sjálvur ført fram fleiri ferðir, og vit arbeiða við hesum, sigur Steibjørn O. Jacobsen, borgarstjóri.

### Nógv privat stykki ónýtt

Borgarstjórin sigur seg harmast, at tað eru millum 60 og 80 grundstykki í býnum, sum privat eiga, men sum ikki verða brúkt.

– Hesi grundstykki eru klár at byggja hús á, men vit sleppa ikki fram at teimum, tí privat fólk eiga tey. Kommunan hevur í fleiri førum gjørt veg til hesi grundøki, men tað verður ikki bygt á teimum. Tað er spell, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

Kristian Eli Zachariassen mælir í sínari grein til, at bygt verður á slættanum omanfyri Niðan Horn, har hann heldur, at 100 grundstykki kunnu gerast, men eingin ítøkilig ætlar er um at útstykkja har í næstum.

# Leggur upp til størri samstarv millum nevndir, ráð og eftirlit

**Løgtingskvinnan Annita á Fríðriksmørk spyr løgmann, um hann heldur tað verða eitt gott hugskot at økja samstarvið millum almennar nevndir og ráð og harvið styrkja bæði umsiting og fakliga arbeiðið. Hon spyr somuleiðis um økt samstarv millum tey ymsu almennu eftirlitini**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Løgtingskvinnan Annita á Fríðriksmørk vil nú hava at vita frá løgmanni, hvat hann heldur um bygnaðin við almennum nevndum, ráðum og eftirlitisstovnum, og um hann hevur nakrar ætlarnir at broyta bygnaðin og arbeiðsháttin.

– Tað tykist at eyðkenna bygnaðin við verandi almennu miðfyrisiting og fyrisiting, at hetta ber brá av at vera eitt avrit av donskum leisti. Alt gott um danskan leist og fyrisiting, og er hetta uttan iva frálíkt til donsk viðurskifti, har fólkatalið er gott og væl 100 ferðir størri enn okkara, og har fíggingarmøguleikar og talið av fólki at taka av er samsvarandi

– Men tá ið talan er um føroysk viðurskifti, kann hugsast, at tað er óheppið, um bygnaðir verða avritaðir, sigur Annita á Fríðriksmørk í viðmerkingunum til sínar tveir fyrispurningar.

### Samskipa arbeiðið meira

Annita á Fríðriksmørk spyr løgmann, hvussu nógv almenn ráð, almennar nevndir og eftirlit eru í Føroyum, og hvussu hesi eru mannað. Hon spyr eisini løgmann, um hann heldur verandi bygnað hóska til føroysk viðurskiftið. Um bygnaður ikki er hóskandi, so vil hon hava at vita, hvat løgmaður ætlar at gera við tað.

Løgtingskvinnan vil eisini hava at vita, um tað kundi styrkt ráðini, nevndirnar og eftirlitini, um arbeiðið hjá teimum var meira samskipað.

– Kann hugsast at fleiri av hesum nevndum og ráðum kundu samstarva um eitt nú tær fyrisitingarligu uppgávurnar – so sum roknskap, fíggjarætlan, fyrisitingarligar mannagongdir, telefonavgreiðslu og nøktandi høli og annað, spyr Annita á Fríðriksmørk.

Hon spyr løgmann, um hann heldur hetta verða eitt gott hugskot, og um hann hevur í hyggju at gera nakað við tað.

Løgtingið skal fríggjadagin atkvøða um teir báðar fyrispurningarnar frá Annitu á Fríðriksmørk.

# Fríggjadagin fer tjaldið frá

**Fríggjadagin verður fíggjarlógaruppskotið lagt fyri løgtingið. Landsstýrismaðurin vil ikki siga eitt orð um uppskotið fyrr enn tá, men tað skilst, at hallið verður nakað tað sama, sum tað fyri 2005**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Fríggjadagin verður tað avdúkað, hvussu fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrinum fyri 2006 sær út*

Fríggjadagin verður fíggjarlógaruppskotið fyri 2006 lagt fyri løgtingið. Tingfundur er ásettur at verða klokkan 10.00, og framløgan av fíggjarlógaruppskotinum verður á hesum tingfundinum.

Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, fer fríggjamorgunin eisini at hava tíðindafund um uppskotið, og har fer hann at greiða frá teimum týðandi tættunum í uppskotinum hjá landsstýrinum

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum er tættur sum tunnan, nú uppskotið er liðugt, og tað verður bíðað eftir, at framløgan skal vera.

– Eg sigi ikki eitt orð um uppskotið fyrr enn fríggjadagin, sigur hann avgjørdur.

*Men hevur tað verið trupulari enn vanligt at gjørt fíggjarlógaruppskotið í ár?*

– Tað er altíð trupult at gera eitt uppskot um fíggjarlóg – ikki minst tá ið mann manglar pengar.

### Líknandi hall

Viðgerðin av fíggjarlógaruppskotinum hevur ikki verið løtt, tí landskassin er hóttur av vaksandi halli. Tá ið framrokningar vórðu gjørdar av inntøkum og útreiðslum, vísti úrslitið eitt minus á 430 milliónir krónur, men síðani hevur verið arbeitt við at fáa hallið niður.

Sambært keldum hjá Sosialinum verður hallið fyri 2006 á leið tað sama, sum tað var fyri uppskotið í 2005 – tað vil siga góðar 200 milliónir krónur. Eingin fæst tó at vátta hetta alment.

Sambært stýrisskipanarlógini skal uppskotið um fíggjarlóg leggjast fyri løgtingið áðrenn 1. oktober, og uppskotið er nú til prentingar.